# Tvey smá undur

*Fyri fyrstuferð í danmarkarsøguni eru børn fødd, eftir at læknar hava havt eggini úr úr mammuni og  skilt sjúk egg burtur, tí ótti var fyri at fáa barn við Cystiskari Fibrosu. Helin og Heri Klein Olsen fingu sunnar og frískar tvíburðar*

DAGFINN OLSEN

Danska blaðið Jyllands-Posten visti í gjár at siga, at danskir vísindamenn hava nýtt nýggjan og kollveltandi hátt at frukta egg hjá kvinnum, ið annars eru í vanda fyri at fáa barn við Cystiskari Fibrosu.

Fyri fyrstu ferð í danmarkarsøguni eru børn fødd – enntá tvíburðar – eftir at granskarar hava tikið eggini hjá kvinnuni út og skiltu sjúku eggini burtur, tí foreldrini bóru ótta fyri at fáa enn eitt barn við lungnasjúkuni Cystisk Fibrosa.

**Royndir**

Føðingin av tvíburðunum er úrslit av fimm ára granskingarætlan, sum Fertilitetsklinikken á Sjúkrahúsinum í Skejby byrjaði í februar í 1999.Har hava tey loyvi at fremja genetiskar eggjaroyndir á kvinnur, sum eru í vanda fyri at føða barn við arvaligum sjúkum, ið geva svár brek og vanda fyri deyða á ungum árum.

Sum tíðin líður vóna granskarar, at teir eisini fáa møguleika at avdúka sjúkur, ið ikki eru so arvaligar, við nýggja kanningarháttinum sum grundarlag. Yvirlæknin Jakob Ingerslev, metir, at hetta er at fara um mørk, ið vit áður ikki eru farin um.

– Tí mugu vit hava viðgerðina í stuttum tjóðri eina tíð. Men eg meti kortini ikki, at ein stendur seg best við at gera viðgerðarháttin frían. Óttin fyri, at ein og hvør velur henda viðgerðarhátt er ógrundaður, tí í veruleikanum er talan um krevjandi viðgerð.

Hann vísir aftur, at eggjaskiljingin er fyrsta stig móti rasureinføri.



*Helin Rasmussen og Heri Klein Olsen fingu sunnu tvíburðarnar Leilu og Juliu, í november - eftir útskiljing av sjúkum eggum. Bæði foreldrini eru berarar av cystiskari fibrosu og 9 ára gamla dótturin Angeli hevur sjúkuna. Parið er ættað úr Vestmanna. Tey búgva í Danmark*
**Mynd. C. Andreasen**



*– Sjálvur meti eg, at t.d. øll børn við cystiskari fibrosu ella mongolismu, bæði eru og eiga at vera eins væl komin, og øll onnur, leggur Rólant í Skorini dent á.*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Altíð persónligt og ymiskt

*– Etiskt má sigast, at avgerðin í hvørjum einstøkum føri má vera persónlig og ymisk, sigur Rólant í Skorini*

DAGFINN OLSEN

Í samband við greinina um cystiska fibrosu, viðgerð og frísku tvíburðarnar, hava vit vent okkum til formannin í siðsemisnevndina, Rólant í Skorini, eftir eini viðmerking.

Hann leggur dent á, at hann kann ikki úttala seg sum formaður í nevndini, men bert sum einstaklingur.

Eisini viðmerkir hann, at uppgávan hjá siðsemisnevndini bert er at játta ella nokta ávísar granskingarætlanir.

– Vit eiga at gera okkum greitt, at eggjaskiljing í sær sjálvum kann nýtast sum rasuskilnaður og rasureinføri. Tað er alneyðugt, at vit varnast vandarnar, tí tess meira vit eru varug við teir, tess betur kunnu vit meta um, nær loyvi kann gevast og betur eru vit før fyri at gera reglur, sigur Rólant í Skorini.

– Umráðandi er, at vit finna fram til tær treytir, sum skulu lúkast hjá hjúnum og fostrum, fyri at viðgera ella fremja fráskiljing av eggum.

– Eg sjálvur, og so vítt eg veit øll í nevndini, eru ímóti viðgerð, sum ber brá av rasureinsing, sigur Rólant í Skorini.

Spurningurin er so, hvørjar reglur skulu vera fyri viðgerð og skiljing av eggum.

– Í løtuni meti eg, at viðgerð bert kann lovast í »etiskari neyðstøðu«. T.v.s., tá mett verður, at hin einstaki, fostur ella mamma, eru í slíkari neyð, ella fer at koma í slíka neyð, at lívið verður ótolandi, um einki verður gjørt, metir Rólant í Skorini.

Hann heldur, at eisini má hugast um, hvussu vit vísa mannalívinum, bæði frískum og sjúkum, størst virðing.

– Tá verður spurningurin: hjálpa vit fostrinum, í hesum førinum egginum, best við at royna at bøta um lívsdygdina - ella møguliga stytta um pínuna, sigur Rólant í Skorini.

– Foreldur og læknar mugu meta um,hvat tað, ið vit rópa kvalitativt góða lívið, er. Eisini má sjálvsavgerðarrætturin hjá foreldrunum virðast. Hvørki samfelag, politikarar ella granskarar kunnu nakrantíð fáa loyvi at avgera fyri ella mótvegis foreldrum, hvør rætta viðgerðin er. Foreldur mugu, við hollari vegleiðing og stuðuli, hjálpast til sjálvi at meta um, hvat lív egg ella fostur fer at megna at bera. Og hvat tey sjálvi fara at megna at bera, sigur Rólant í Skorini.

– Etiskt má sigast, at avgerðin í hvørjum einstøkum føri má vera persónlig og ymisk, Tað eigur ongantíð at bera til hjá politikarum ella granskarum at seta lista upp yvir, hvørji genetisk brek skulu fáa viðgerð ella skulu fyribeinast. Ella hvørji skulu fáa loyvi at yvirliva. Slíkur listi, meti eg, hevði verið at mett, sum rasureinsing, sigur Rólant í Skorini.

– Vit mugu sum grundreglu hava, at alt mannalív má javnmetast, soleiðis, at ein við breki - hvussu álvarsligt tað so fyri okkum sær út at vera - kennir seg líka vælkomnan, sum einhvør annar í samfelagnum.

– Tí meti eg, at møguligt tilboð ella loyvi um genetiska viðgerð bert kann játtast, um bæði læknar og foreldur eru samd um, at annaðhvørt fostrið ella mamman er í slíkari neyðstøðu, at neyðugt er við viðgerð, metir Rólant í Skorini.

– Sjálvur meti eg, at t.d. øll børn við cystiskari fibrosu ella mongolismu, bæði eru og eiga at vera eins væl komin, og øll onnur, leggur Rólant í Skorini dent á.

# Súlan er komin

*Nú hava tey sæð súlu í Mykinesi, men á pálsmessu høvdu tey onga sæð, hóast súla var sædd í Havn longu 8. januar*

DAGFINN OLSEN

Tann 25. januar, á Pálsmessu, kemur súlan í Mykineshólm. Soleiðis verður sagt og hetta stendur eisini eisini í ymsu kalendarunum.

Men tá vit ringdu út til Mykinesar á pálsmessu, høvdu tey onga súlu sæð, men ætlaðu at fara ein túr at hyggja seinni á degnum.

Tey sóu tó onga tann dagin. Men nú hava tey sæð súlu í Mykinesi. Onkur hevur sæð 4 súlur.

Tað er ójavnt, nær súlan kemur í Mykineshólm. Hon kann koma áðrenn pálsmessu, men eisini seinni. Tað er ikki altíð etir tí, sum stendur viðmerkt í álmanakkanum.

Ein forvitin og vakin lesari í Havn, sum strvast Yviri við Strond, ringdi til Sosialin og boðaði frá, at Yviri við Strond høvdu teir longu 8. januar sæð súlu.



**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Natúr, Tjaldursgjógv og Grót

DAGFINN OLSEN

Í kvøld verður tónleikatiltak í Losjuni í Gøtu, sum felagið Grót skipar fyri.

Á pallin fara Eivør Pállsdóttir Kvartett og Shalder Geo. Navnið er úr Hetlandi og Geo úttalast »djó«. Tjaldursgjógv. Bólkurin var stovnaður til fløguupptøku í 1997 og við eru Kristian Blak, Heðin Z. Davidsen, Høgni Klakkstein og Mikael Blak.

Saman við Eivør Pállsdóttir leika Mikael Blak, Búi Dam og Brandur Jacobsen.

Bólkarnir spældi á Café Natúr í gjár.

Komandi vikuskiftið spæla bólkarnir á Café Natúr og í Atlantis í Klaksvík.

Tiltakið í Gøtu í kvøld byrjar klokkan 20:00.

Tiltakið er partur av størri konsertferð í Norðurlondum.






# Løgreglan viðger seg sjálva

*Føroyar eru einasta politiumdømi í danska kongaríkinum, har løgreglufólk framvegis viðgera kærur um løgregluni. Føroyska kæruskipanin er ikki trygg fyri borgarar, sum halda at politiið er lopið framav, siga advokatar*

DÁNJAL HØJGAARD

Løgreglumenn skulu ansa eftir landsins borgarum. Men løgreglumenn kunnu eisini sjálvir koma at gera nakað skeivt, og tá er spurningurin hvør ið skal ansa eftir teimum.

Í Danmark sleppur politiið ikki longur at viðgera og taka støðu til kærur um politiið. Hetta tryggjar ein skipan, ið verður rópt kærunevndarskipanin.

Í kæruverdarskipanini er tað er ein statsadvokatur, sum viðger kærurnar um løgregluna. Í øðrum lagi skal ein óheft nevnd hava eftirlit við at úrskurðurin hjá statsadvokatinum er í lagi.

1. januar var ein líknandi skipan sett í verk í Grønlandi.

Men í Føroyum situr løgreglan framvegis við borðið, tá kærur um politiið skulu viðgerast.

Her er skipanin við eini sonevndari lokalnevnd framvegis galdandi. Lokalnevndin ger ongar kanningar sjálv. Hon tekur bert ímóti kærum, og sigur frá um málið er nóg væl lýst.

Í lokalnevndini eru átta limir, sum viðgera kærurnar um politiið. Ein advokatur, fýra løgtingsmenn, fútin - og tveir løgreglumenn.

**Eru bundnir**

Bjørn á Heygum, advokatur heldur tað vera skeivt, at løgreglan sleppur at viðgera kærur um seg sjálva.

-Tað er altíð skeivt at sita í eini nevnd og viðgera seg sjálvan. Løgreglumenn ella umboð fyri løgregluna kunnu av góðum grundum ikki vera heilt objektivir, tá tað snýr seg um kærur móti starvsfeløgunum, sum eru farnir út um mark, sigur advokaturin, sum hevur lítla tiltrúgv til lokalnevndina sum eftirlitsstovn í málum um politikærur.

-Umboðini fyri politiið og ákæruvaldið eru av góðum grundum bundin av ávísum áhugamálum, sum kunnu gera seg galdandi í lokalnevndini. Tí kunnu teir í ein ávísan mun koma at føra sjónarmið fram, sum røkja teirra seráhugamál, sigur Bjørn á Heygum.

**Misálit**

Tað er ein sannroynd, at lokalnevndin í Føroyum verður lítið brúkt. Tað er sera sjáldan at nakar yvirhøvur vendir sær til nevndina fyri at kæra um atburðin hjá politinum.

Christian Andreasen, advokatur heldur, at orsøkin til at tað er so kvirt í kærunevndini er, at eingin hevur tiltrúgv til kæruskipanini.

-Lokalnevndin verður so at siga ongantíð brúkt. Orsøkin man vera, at advokatar yvirhøvur hava ongan tiltrúgv til at tað loysir seg at fara til hesa nevndina, sigur Christian Andreasen, sum heldur tað vera óheppi, at løgreglumenn sita í eini nevnd, sum skal taka støðu til sínar starvsfelagar.

-Tað er rein fiksjón, at løgtingsmenninir megna at umboða kæraran í eini slíkari nevnd. Politiið situr jú við fakkunnleikanum og hevur tískil lætt við at tala hinar nevndarlimirnar til rættis, sigur hann.

Í Danmark varð kæruskipanin broytt, eftir atfinningar høvdu verið um, at gamla kæruskipanin ikki vardi borgararnar nóg væl. Málið varð reist politiskt og Fólkatingið broytti lógina, so at kærunevndarskipanin kundu setast í verk.

# Varafútin: Ongin trupulleiki

Eingi bendir á, at tað troðkar á, at fáa kærunevndarskipanina setta í verk í Føroyum.

Hetta sigur Finn Ougaard, varafúti, nú Føroyar standa eftir sum einasta politiumdømi í ríkinum har løgreglan framvegis sleppur, at vera við í viðgerðini av kærum um politiið.

-Er hetta veruliga ein so stórur trupulleiki, at vit noyðast undir at stápla eina rúgvu uppá beinini, spyr fútin, sum heldur at tey fáu kærumálini móti politinum tala fyri seg.

-Tað eru øgiligar fáar kærur um atburðin hjá politinum, sum uppgávan hjá nevndini er at taka sær av. Hvat er so endamálið við at broyta skipanina, spyr varafútin.

-Eg havi ongantíð hoyrt nakran seta fram ynski um at skifta verandi skipan út, sum eftir øllum at døma virkar væl. Tíbetur eru fáar kærur um atferðina hjá politinum, sigur Finn Ougaard.

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUT. (Sýnaður 15-10-98)
Skrás.:13-07-95
Km.: 76.000
Prísur: 158.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 Xli H/B
Skrás.: 31-10-96
Km.: 34.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA CAMRY 2,2 XL
Skrás.: 21-12-91
Km.: 80.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 Xli
Skrás.: 24-06-97
Km.: -
Prísur: 112.600,- Garanti**

TOYOTA CARINA E 1,8
Skrás.: 06-11-96
Km.: 68.000
Prísur: 119.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 05-08-92
Km.: 110.000
Prísur: 45.600,-

TOYOTA CARINA 2,0 TURBO DIESEL
Skrás.: 16-10-96
Km.: 122.000
Prísur: 132.600,- Garanti*

FORD ESCORT DIESEL
Skrás.:19-09-96
Km.: 54.000
Prísur: 114.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 GL L/B
Skrás.: 21-08-90
Km.: 124.000
Prísur: 60.600,-

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
Skrás.: 30-01-96
Km.: 47.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 GL (Sýnaður 14-10-98)
Skrás.: 01-11-89
Km.: 154.000
Prísur: 49.600,-

HONDA CIVIC 1,5 H/B
Skrás.: 01-08-98
Km.: 26.000
Prísur: 119.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 10-06-98
Km.: 30.000
Prísur: 142.600,- Garanti**

FORD FIESTA 1,3
Skrás.: 16-12-97
Km.: 19.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 L/B TERRA
Skrás.: 27-02-98
Km.: 30.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

FORD FIESTA 1,3
Skrás.: 29-04-96
Km.: 104.000
Prísur: 59.600,-

TOYOTA CAROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 12-02-96
Km.: 16.000
Prísur: 97.600,- Garanti*

FORD ESCORT 1,6 (Sýnaður 26-03-98)
Skrás.: 21-05-91
Km.: 128.000
Prísur: 42.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 Xli
Skrás.: 14-07-95
Km.: 32.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

NISSAN MAXIMA 3,0 AUT. GEAR (Sýnaður 01-12-99)
Skrás.: 15-12-87
Km.: 135.000
Prísur: 69.600,-

AVHEINTINGARTILBOÐ
FORD SIERRA 1,6 AUT. GEAR
Skrás.: 01-07-87
Km.: 117.00
Prísur: 10.000,- (Sýnaður 01-10-98)

TOYOTA HIACE 10 PERS. BUSSUR
Skrás.: 16-06-95
Km.: 160.000
Prísur:138.600,- Garanti*

SERTILBOÐ
KIA CLARUS 1,8 SEDAN
Skrás.: 16.04.98
Km.: 13.000
Prísur: 98.600,- Garanti*
-í besta standi !!

VØRUVOGNUR
MITSUBISHI PAJERO VAN
Skrás.: 05-10-95
Km.: 80.000
Prísur: 154.600,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040